Hugnaligt tilhald á Sandi

Dagtilhaldið Hugnin á Sandi er flutt í nýggj og rúmlig høli í húsunum hjá Sands Kommunu. Samkoma var mikudagin, har hølini vórðu víst fram fyri almenninginum

HUGNI

Orð og myndir
Edvard Joensen

Sandi: Hugnaligt er at koma á gátt hjá pensionistunum í Sandoynni, sum tvær ferðir um vikuna hittast í tilhaldinum Hugnanum heima á Sandi.

Hóast tilhaldið er í húsunum hjá Sands Kommunu, sum eisini hevur søkt um stuðulin til og stendur aftan fyri tiltakið, er hetta ætlað øllum eldri sandoyggjafólki. Og tað koma eisini fólk úr øllum bygdum í oynni til tiltøkini, sum skipað verður fyri, sigur Kristina Johannesen, sum er leiðari fyri tiltakinum.

Jú. Tey kundu tað sama sungið gamla missiónssangin »De kommar från öst och vest«, hóast tað, at tey flestu kortini mundu vera heiman av Sandi.

Men nú er tað tað, at tey eru júst flutt úr missiónshúsinum í húsini, sum Sands Kommuna nýliga hevur ognað sær, til kommunuskrivstovu og onnur tiltøk, sum vera kunnu í slíkum húsum. Millum annað dagtilhaldinum fyri tey eldru.

Og tey møttu stundisliga hendan dagin, húsið alment varð tikið í nýtslu, hóast hann var tann ringasti til veður hesumegin nýggjár. Stormurin leikaði í, so tað stóð alvorliga á postkassanum í Skopun, og rættiligur uppgangur var í Todnesi, har Kálvur Lítli gamli ivaleyst hevði havt hugsað um illveðrið á Genesaretvatni, sum annars var evnið í morgunlestrinum í Útvarpinum júst hendan sama morgun.

Nógv tiltøk

Men annað skal enn stormur og eitt sindur av vátaslettingi til at halda pensionistum frá at koma til hugnaliga samveru. Soleiðis eru tey yvirhøvur, sum ganga til hesi tiltøkini, og sandingar eru einki undantak. Og tey hava nógv at koma til, sigur Kristina Johannesen.

Hon er sett í halvtíðarstarv til burtur av at taka sær av tilhaldinum. Fyrireika og standa fyri

Ljós og blómandi tykist framtíðin. Og enn er langt til pensionistaaldur

Talv fe handa

Tey lurta spent eftir røðuni hjá borgarstjóranum

Menninir hildu seg eitt sindur burturfrá, men sóu kortini út til at h